Klumman

# So er daman í galla og fjong...

Hurráaa vit eru boðin í veitslu. Ein ordiliga eina av slagnum. Í bygdarhúsi við sangheftum, kókikonu, plastikstólum og tað heila. Hilla-di-hey og hopsassa!

So skal frúan oman aftur í Brúksina at keypa sórnar sokkabuksir, sum glinsa og halda øllum innanborða. So hon verður ein ordilig sild hesa náttina við sildasalat og sildavalsi til tann stóra papptallerkin.

Og vit finna eina gávu, sum hóskar akkurtát til móttakaran – ein fýrakantaðan pengaseðil í einum hvítum brævbjálva. Genialt!

Og allar yvir 40 fara til somu frisør, so allar verða líka: stutt, svart við løgnum frunti og klimateriureyðum refleksum. Soo fínt!

Og fara upp á Nupo, tí tað bér also til at tapa seg 2½ kilo upp á pulvur í eina viku – man skal baaara drekka massar av vatni eisini. So passa vit kanska tjóðarbúnan eina veitslu afturat. Onki problem!

Og kroysta okkum niður í sórnar undirbuksir, sum stramma búkin inn og reyvina upp og út. Ordiliga sputnikk!

Og eta onki tann dagin, ballið skal standa, og vit svíma út á seinnapartin, men drekka bara meira vatn. Huff!

Og fara til sól sama dag og gloyma skeltið við »nýggj rør«. Russari!

Og vilja bjaga taintinum við sjálvbrúnara, og enda sum ein flekkut súgv. Kiksað!

Og sjálvandi ein nývaknaðan bums mitt á pannuna. Plettskot!

Og keypa nýggjar skógvar, sum eri sooo penir, men áttu at verið gingnir til í nakrar vikur. Av!

Og punktum verður sett við einum svalligum sjussi, meðan lebastiftin knekkar, lummaullin verður rist úr selskapstaskuni og neglalakkið turkað undir einum hysteriskum fønara.
So er daman í galla og fjong ... og klár at blaka seg í song!



*Rigmor Dam*



*»Luncheon of the Boating Party 1880«, Pierre-Auguste Renoir (1841-1919)*

## Veitslu pli

- Brúka ikki toyserviettin at turka munnin við. Hann skal liggja á fanginum, meðan tú etir
- Borðharrin situr vinstrumegin damuna, og hann sær til, at hon hugnar sær undir borðhaldinum – eisini um hon er ein gomul tanta
- Tað er ein ósiður at dominera skiparan í føroyskum dansi
- Brúka fyrst tað uttasta bestikkið, og síðan tað næstuttasta og so framvegis.
- Tosa ikki um viðbrekin evni við fólk, tú ikki kennir væl. Til dømis politikk, religión, fólkasløg og pengar.
- Borðplanurin verður lagdur soleiðis, at nærmasta familjan situr næst vertunum. Síðan vinnur aldur yvir ungdóm.
- Kom til tíðina ella innan fyri eitt kortér ov seint. Kom ongantíð ov tíðliga.
- Ein góð røða er stuttlig og kærleiksfull. Hon skal snúgva seg um høvuðspersónin og ikki um røðaran. Tað er óskikkur at særa høvuðspersónin í røðu ella sangi.